# LANDSROYND 4. FLOKKUR

mars 2011

## Føroysk fyrisøgn

(Fyrst verður fyrisøgnin lisin í síni heild fyri næmingunum. Síðani verða teir einstøku partarnir ímillum skrástrikurnar lisnir tvær ferðir. Punktum og komma verða lisin. Orðini við feitari skrift eru tey orð, ið næmingurin skal skriva. Loyvt er næmingunum at hava við sær til royndina, orðalistar og orðabøkur, sum verða nýtt í vanligu undirvísingini í føroyskum í 4. flokki.)

-Eg **eri so rík/** sum **ein risi**,/ plagdi **Pippi** sjálv/ at **siga/**. Og so var/. Hon **átti** ein klæðsekk/ **fullan** av gullpengum/, sum hon **hevði fingið/ frá** pápa sínum/. So hasin fremmandi ferðamaðurin/ **skuldi** ikki **halda/, at** Pippi/ leið nakra **neyð/. Hon kláraði seg/** so øgiliga **væl/** við ongari **mammu/** ella **pápa/**. Gaman í, **hon** hevði ongan/ at siga **sær/**, nær hon skuldi/ fara í **song/**. Men Pippi hevði funnið **upp** á/ ein **góðan** máta/: Hon **segði** tað/ **við** seg sjálv/! Við hvørt/ segði hon tað ikki/ **fyrr enn** um 10-tíðina,/ tí Pippi hevði **ongantíð/** rættiliga trúð/, at **børn** eiga at **fara/** í song **klokkan** sjey/, **sum** tey siga/. **Tað** er **eisini** tá/, at tað **ofta** er allar stuttligast/. Tí átti **tann** fremmandi ferðamaðurin/ **ikki** at undrast/, um **hann sá** Pippi/ klúgva í urtagarðinum/, hóast **sólin** var næstan/ **farin niður/**, og tað var farið at kólna/, og Tummas og Annika/ **langt síðani/** lógu í seingini og **svóvu/**.
Hvørji vóru Tummas og Annika/? Assj, tað var **heldur/** ikki **gott/ hjá** tí **fremmanda/** ferðamanninum/ at **vita/**! Tummas og Annika/, tey vóru **vinirnir** hjá Pippi/, veitst **tú**!/ Sum **búðu** í húsunum/ **beint** við Villingavál/. Tað **var** spell/, at hasin ferðamaðurin/ ikki kom **eitt sindur** fyrr/, tí so hevði hann **sæð** Tummas og Anniku/. So hevði hann sæð/ **tvey** øgiliga **fitt/** og **fín** børn/, eg **meini** tað/. **Einki** var/ so **vist** sum tað/, at hann hevði **hitt/** Tummas og Anniku hjá Pippi/, **bara** hann var **komin/** eitt sindur fyrr/. Tí Tummas og Annika **runnu/ yvir til** Pippi/ hvønn **dag/** og **vóru altíð/** hjá **henni/, uttan/ tá ið** tey svóvu/, **og** tá ið tey **ótu/**, og tá ið tey vóru í **skúla/**.
**Men** tað var/ so **seint** á kvøldi/, at tey lógu sjálvandi og svóvu/, tí Tummas og Annika/ áttu **bæði** pápa og mammu/, og bæði pápin og mamman/ høvdu **sett** sær í høvdið/, at tað var **best/ fyri øll** børn/ at fara í song/ klokkan **sjey/**.

**Hetta** var eitt **brot/** úr søguni um Pippi/, sum er heimsins sterkasta **genta/**. **Tit** hava **kanska/** lisið onkra **bók/** ella sæð onkran **film/ um hana/,** tí **søgan** um Pippi/ er kend um allan **heimin**.

*(Brot úr bókini Pippi fer umborð eftir Astrid Lindgren. Turið Sigurðardóttir týddi. BFL gav út í 1995)*